## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Um morgunin upp í ein strúk av eystri og regn. Út á fyrrapartin lækkar hann niður í sunnan og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av suðri og sólglottar, men okkurt ælið. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann veksur vindin upp í ein strúk av landsynningi og eystri og fyrrapartin regn. Seinnapartin lækkar hann niður í sunnan og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Hotel Eiði hevur skift eigara og navn

**Vertsfólkini í Lonini í Elduvík hava keypt Hotel Eiði og nevna tað nú Hotel Lonin á Eiði. Nýggju eigararnir byrjaðu á hotellinum fyrsta juni, og gevast samstundis við virkseminum í Elduvík**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

**Eiði:** Hotellið á Eiði hevur skift eigara og skiftir samstundis navn frá Hotel Eiði til Hotel Lonin á Eiði.

At hotellið fer at eita Hotel Lonin kemst av, at tað eru vertsfólkini á matstovuni Lonini í Elduvík, sum hava keypt hotellið á Eiði.

Nýggju eigararnir eru Jóhanna og John Nielsen, ið búgva á Eiði, haðani Jóhanna er ættað. John er dani. Eisini fer sonur teirra, John, at arbeiða á hotellinum.

Nýggju eigararnir siga, at ætlan teirra er at hala fram við vanligum hotelvirksemi. Tó verður tann avgerandi broyting í hotelrakstrinum á Eiði, at tey ætla at hava opið alt árið. Hotel Eiði hevur framman undan bert havt opið um summarið, men hevur kortini eftir avtalu havt eitt nú skeiðvirksemi í vetrarhálvuni.

Fyrstu gestirnir hjá nýggju hoteleigarunum á Eiði eru komnir, og væntandi verður hotellið fult nú í komandi døgum, tá fótbóltslandsdystur verður í Føroyum.




*Hotellið á Eiði hevur nú skift navn. Tað eitur nú Hotel Lonin á Eiði. Beint uttan fyri hotellið hevur Eiðis Kommuna gjørt tjaldingarpláss við atgongd til bæði tjøld og bilar*

Avgjørda vørumerkið hjá Lonini í Elduvík hava verið teir landskendu búffarnir, sum fólk eru komin langvegis frá at fáa sær. Teir fylgja við til Eiðis, siga nýggju hotelvertirnir á Eiði.

Eisini er hugsað um møguleikan fyri tiltøkumi. Bæði mentanarligum og øðrum, siga tey. Eitt nu er nærliggjandi at hava listaframsýnignar hangandi, eins og hugnakvøld av onkrum slagi væl kunnu haldast á hotellinum.

Tey vilja ikki siga nakað um prís ella keypstreytir annars, men bara, at tey hava góðar vónir til at tað fer at bera til. Onkrar bábøtur skulu gerast á hotellið, siga tey. Men opið verður kortini hvønn dag.

# Maersk Air letur egna skrivstovu upp í Havn

**Flogfelagið Maersk Air vil hava størri part av ferðafólkatalinum millum Føroyar og Danmark. Felagið letur upp egna skrivstovu í Havn**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Maersk Air fer at lata egna ferðaskrivstovu upp í Handilskjarnanum í Havn tann fyrsta juli. Væntandi fara eini trý fólk at arbeiða á skrivstovuni.

Maersk Air ætlar sær størri part av ferðafólkatalinum loftvegis millum Føroyar og Danmark, sigur Keld Mosgaard Christensen, rutuleiðari hjá Maersk Air.

Maersk Air hevði fyrr Flogfelag Føroya sum fast umboð í Føroyum, men segði hesa avtaluna upp fyri nøkrum árum síðan.

Nú verður farið aftur hinvegin, sigur Keld Mosgaard. Men hesaferð við egnari skrivstovu, sum skal royna at fáa størri part av ferðafólkunum í bláu flogførini.

Hann sigur, at tað er neyðugt at koma nærri kundunum, og tað gerst best við eini skrivstovu í økinum, heldur hann. Enn er fólk ikki sett at taka sær av hesi tænastuni. Søkt fer at verða eftir leiðara fyrsta dagin. Væntandi fara eini trý fólk at arbeiða á nýggju ferðaskrivstovuni í Handilskjarnanum.



*Maersk Air vil rættiliga hava part av ferðafólkatalinum millum Føroyar og Danmark og fer nú at lata upp egna ferðaskrivstovu í Handilskjarnanum í Havn, sigur Keld Mosgaard Christensen, rutuleiðari hjá Maersk Air*

Eisini á øðrum økjum er Maersk Air farið at gera vart við seg í Føroyum. Eitt nú við sponsoravtalum innan ítróttin. Bæði B36 og Sumbiar Ítróttarfelag hava gjørt sponsoravtalu við felagið. Og kanksa er onkur onnur ávegis eisini, vilja tey halda hjá Maersk Air.

Keld Mosgaard Christensen sigur, at Maersk Air er komið fyri at verða í Føroyum. Hóast flogferðslan ikki soleiðis sum heild, eru ikki ætlanir um at minka um virksemið á Føroyarutunum. Heldur øvugt, sigur hann og vísir til at felagið nú fær egna skrivstovu í Føroyum.

Maersk Air hevur umframt Føroyarutuna eisini rutuflúgving úr København og Billund til fleiri europeiskar floghavnir.

Poul Arni Jacobsen, stýrisformaður:

# Heldur seg hava givið nøktandi upplýsingar

**Stýrisformaðurin í SEV, Poul Arni Jacobsen, heldur fast við, at stýrislimirnir fingu nøktandi kunning á fundinum tann 28. mars, har formaðurin fekk heimild at skriva undir við Maskinmeistarafelagið**

SEV
*Stefan í Skorini*

Dia Poulsen, stýrislimur hjá SEV, førdi í blaðnum í gjár fram, at hann ikki hevði fingið nóg góða kunning, tá stýrið gav stýrisformanninum heimild at skriva undir við Maskinmeistarafelagið.

Um hann visti av, at Karsten Hansen ikki fór at góðkenna sáttmálan, sum SEV hevði samrátt seg fram til, hevði hann ikki givið stýrisformanninum heimild at skriva undir, tó við tí fyri eyga at stytta sáttmálaskeiðið til eitt ár ístaðinfyri tvey.

– Vit halda nú aftaná, at vit hava givið stýrislimunum nøktandi kunning, og vit halda okkum hava greitt frá, at Karsten Hansen ikki ætlaði sær at góðkenna sáttmálan, sigur Poul Arni Jacobsen, stýrisformaður.

Hann vísir á, at tveir stýrisfundir vóru aftaná, at partarnir høvdu skrivað undir, og at stýrið síðani hevði fundir við bæði Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið. Tað eru tískil ymiskar uppfatanir av, hvat farið er fram á fundunum tann 27. og 28. mars.

### Fingu ikki ultimatum

Í tíðindaskrivi, sum er dagfest 8. mai, frá stýrisformanninum í SEV stendur, at Karsten Hansen tann 27. mars boðaði frá, at hann ikki fór at góðkenna eina so høga lønarhækkan. Hví skrivaði stýrisformaðurin so undir dagin eftir?

– Vit uppfataðu ikki boðini frá Karsteni Hansen sum eitt ultimatum, tí so høvdu vit ikki farið aftur til Maskinmeistarafelagið og roynt at fingið sáttmálaskeiðið stytt, sigur Poul Arni Jacobsen.

– Eg haldi, at tað hevði verið rímiligt, at vit fingu hesa fráboðan skrivliga, sigur Poul Arni Jacobsen. Hann lastar sostatt Fíggjarmálaráðnum fyri ikki at hava gjørt nóg mikið fyri at boða frá sínari støðu, hóast fíggjarmálaráðharrin boðaði frá hesum munnliga.



## VESTFALLSKYRRINDI

28. mai: Mánin longst frá jørðini
31. mai: Tendring
7. juni: Fyrra kvarter
12. juni: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. juni | 10.43 | 23.07 | 09.43 | 22.07 | 09.58 | 22.22 | 00.20 | 12.43 | 01.20 | 13.43 | 08.58 | 21.22 |
| 5. juni | 11.30 | 23.53 | 10.30 | 22.53 | 10.45 | 23.08 | 01.07 | 13.30 | 02.07 | 14.30 | 09.45 | 22.08 |
| 6. juni | — | 12.15 | 11.15 | 23.37 | 11.30 | 23.52 | 01.53 | 14.15 | 02.53 | 15.15 | 10.30 | 22.52 |
| 7. juni | 00.37 | 13.12 | — | 12.12 | — | 12.27 | 02.37 | 15.12 | 03.37 | 16.12 | 11.27 | — |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. juni | 07.58 | 20.22 | 10.58 | 23.22 | 11.58 | — | 10.28 | 22.52 | 11.43 | — |
| 5. juni | 08.45 | 21.08 | 11.45 | — | 00.22 | 12.45 | 11.15 | 23.38 | 00.07 | 12.30 |
| 6. juni | 09.30 | 21.52 | 00.08 | 12.30 | 01.08 | 13.30 | — | 12.00 | 00.53 | 13.15 |
| 7. juni | 10.27 | 23.02 | 00.52 | 13.27 | 01.52 | 14.27 | 00.22 | 12.57 | 01.37 | 14.12 |

5 707265 100036 >